# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ÓHEFTA FISKIVEIÐIREGULERING

Hyggjuráðini hjá Búskaparráðnum er sera áhugaverd, og verður hugt við politiskum brillum, so eru tey rættiliga kontroversiell, hóast boðskapurin er sera einfaldur: Ein óheftur stovnur skal regulera fiskiveiðina – ikki politikararnir.

Vit uppliva tað ferð eftir ferð, at Búskaparráðið kemur við slíkum tilmælum, men politikararnir lurta ikki, tí teir vita altíð betur, og so stendur alt bara í stað, og einki hendir.

Búskaparráðið, sum legði fram várfrágreiðing sína í morgun, vísir á, at burðardyggari fiskiveiða gevur fiskivinnuni støðugari inntøkugrundarlag og skapar vøkstur. Ráðið vísir eisini á, at politisk regulering seinastu 15 árini hevur elvt til eitt alt ov stórt veiðitrýst, og at hetta beinleiðis kann føra til, at vit ongan búskaparvøkstur fáa.

Slíkur boðskapur er sera álvarsamur – og um politiska skipanin ikki tekur slíkt fyri fult, so gevur tað als onga meining at seta eitt búskaparráð at arbeiða við slíkum, tí hvat er tá endamálið, um politikarar í heilum skjóta alt niðuraftur?

Ráðið vísir eisini á, at treytin fyri, at positivum teknini í búskapinum skulu halda fram er, at vit mugu rætta álvarsligu skeivleikarnar í fiskiveiðuni beinanvegin: Og vit kunnu ikki annað enn geva ráðnum rætt, at tað er búskaparliga óforsvarligt at lata politikarar upp á gjøt tilluta fiskiloyvi og áseta fiskidagar eftir egnum høvdi. Ráðið vísir á, at seinastu 15 árini hevur veiðitrýstið verið umleið 50-70% hægri enn tað, ið hevði givið mest búskaparliga og lívfrøðiliga, og hetta hevur eitt nú ført til, at tilsamans hava fiskatilvirking og fiskiveiða eftir botnfiski undir Føroyum at kalla ikki havt avlop seinastu 10 árini.

Trupulleikin er, at Fólkaflokkurin vil ikki flyta seg, og at Tjóðveldi, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin tora ikki at reka fiskivinnupolitikk uttan um Fólkaflokkin, sum hevur havt buktina og báðar endarnar nú í mannaminni. Vit kunnu so bara vóna, at gløgg politisk høvd finna saman



at skipa næstu stjórn, sum tora at avmarka leiklutin hjá politikarum til meira yvirskipað viðurskifti. So kundu politikarar tikið við ráðum um óhefta regulering av fiskiveiðuni, um at strika almenna stuðul til fiskivinnuna, um at leggja tilfeingisgjald á, strika forðingar fyri fríari tillaging í fiskivinnuni, um at selja fiskiloyvi á uppboði – og at selja nýggj rættindi í føroyskum sjógvi á uppboði.

**» Politikarar vita altíð betur enn Búskaparráðið – halda teir**

# Aksel hevur longu vunnið

## – men allir limir selppa ikki til orðanna...



Aksel V. Johannesen hevur longu vunnið valið um at gerast formaður í Javnaðarflokkinum. Tað hevur hann í øllum førum, um vit telja saman atkvøðurnar hjá teimum feløgum, sum mæla til at velja hann.

Javnaðarflokkurin hevur átta limafeløg. Tey eru:

*Norðoyggjar:* 20
*Eysturoy:* 25
*Norðstreymoy:* 8
*Suðurstreymoy:* 36
*Sandoy:* 8
*Suðuroyar Norð.:* 22
*Suðuroyar Syðra:* 12
*Vágar:* 12
*Tilsamans:* 143 *atkvøður.*

Viðmerkjast skal tó, at tølini kunnu broytast, tí ein atkvøða er fyri hvøjar 10 limir - og limalistin skal góðkennast av eini mandatnevnd.

Tá ið Norðoyggjar, Eysturoy, Suðuroyar Norðrara og Vága Javnaðarfeløg velja Aksel V. Johannesen, so fær hann 79 atkvøður. Heðin Mortensen hevur stuðul frá Suðuroyar Sunnara og Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag, og tað gevur honum 20 atkvøður. Eftir eru 44 atkvøður, og tað er ikki nóg mikið til nakran annan, enn Aksel V. Johannesen.

Men allar súðir eru ikki syftar enn, og mangt kann broytast áðrenn leygardagin.

Eitt er, at summi Javnaðarfelag hava havt eina demokratiska tilgongd til formansvalið, har limirnir á limafundi sleppa at siga sína meining. Men í nøkrum feløgum hava nevndarlimir tikið limirnar av ræði og hava gjørt av, hvønn felagið skal stuðla – uttan at spyrja limirnar. Og tað er hetta, sum fær fólk at spyrja, um javnaðarfeløg ikki vilja halda limafund um formansvalið, hvat er so nóg stórt at halda limafund um?

Freistin at stilla upp er úti á middegi mikudagin, og tí er seinasti kjansur at halda limafund um hetta í morgin.

Tað hevði sømt seg, at øll javnaðarfeløg lótu vanligu limirnar koma til orðanna, so nógv klókari eru nevndarlimir í javnaðarfeløgunum ikki enn vanligu limirnir.

Tað er fólkið, sum eigur Javnaðarflokkin. Fólkið er grundsúlan undir javnaðarhugsjónini, tí eigur fólkið sjálvandi at koma til orðanna í formansvalstríðnum hjá Javnaðarflokkinum.



**» Tunlar áðrenn samanlegging**

ATLI S. JUSTINUSSEN
KJAK Á SÍÐU 17



**» 37 eiga at manna tingið**

KÁRI Á RÓGVI
KJAK Á SÍÐU 16

# X-Factor í yvir 50 ár

Hevði okkurt óvíðkomandi fólk komið inn fríggjakvøldið og spurt, hvør hasin var, sum stóð á pallinum, hevði tað neyvan borið til at sannført um, at »hasin á pallinum« hevur væl meira enn 50 ár á baki sum sangari, tónleikari og undirhaldari.

Robert McBirnie var í toppformi fríggjakvøldið, tá hann staðfesti, at hóast fríggjakvøld fyri mong er eitt X-factor kvøld, so kundu tey sæð veruligan X-factor í Sjónleikarhúsinum, ið var fullsett, nú hann á henda hátt valdi at gera eitt sindur burtur úr síni drúgvu tíð á palli.

Hetta var samstundis ein ferð ígjøgnum bæði tíð og stað, tí tað byrjaði við Red Boys. Robert og Jákup Mortensen góvu eina góða smakkiroynd av tí fyrsta á leiðini hjá Roberti, og beint aftaná var tað so Ronnie Nielsen, ið trein pallin saman við Robert, sum ímyndin av tí nýggjara.

Og so koyrdi tað annars bara slag í slag við einum góðum sangi fyri og øðrum eftir, bert avbrotið í smáum av góðum anekdotum innímillum. Settlistin var hegnisliga settur saman, so hann rakk bæði vítt og breitt, og alt tað besta, fólk kenna Robert fyri hesi meiri enn 50 árini, var at hoyra. Ikki minst, tá hann hevði tveir av



*Mynd: Álvur Haraldsen*

gomlu Faroe Boysunum, Jógvan Dahl og Kára Mouritsen, undir liðini á sær.

Tey flestu mundu vita, at talan var um nakrar av Føroya bestu tónleikafólkum, ið løgdu botnin á pallinum, men hóast Finnur Hansen, Ólavur Øster, Arnbjørn Sivertsen, Kolbein Simonsen, Brandur Jacobsen, Malan Thomsen og Torkil Johannesen eru av evnaríkastu fólkum, so skein eisini ígjøgnum, at alt var lagt so sera væl til rættis – og tá koma góðu evnini eisini enn betur til sín rætt.

Her var eingin tilvild, men eitt vælsmurt show frá byrjan til enda, umframt at stemningurin í Sjónleikarhúsinum var ótrúliga góður. Fólk vóru týðiliga komin fyri at njóta løtuna, og tað sluppu tey so eisini, tí her osaði alt kvøldið av – ja, veruligum og langtíðarhaldførum X-factor...

*Hilmar Jan Hansen*

**Sosialurin**
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*